Álit

í

løgtingsmáli nr. 33/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru (Foreldramyndugleikalógin) (Samverusjikana, ferðing í sambandi við samveru, ókeypis advokatumboðan og aðrar broytingar)

Landsstýrismaðurin í lógarmálum, Bjarni Kárason Petersen, hevur lagt málið fram tann 18. oktober 2023, og eftir 1. viðgerð tann 24. oktober 2023 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 7., 21. og 28. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Advokatfelag Føroya, Barnaverndarstovuna, Familjufyrisitingina og Bjarna K. Petersen, landsstýrismann í lógarmálum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Foreldramyndugleikalógin kom í gildi 1. januar 2023 og eftir at hava virkað í eitt slakt ár, er tørvur á at gera nakrar broytingar og nágreiningar.

M.a. verða ásetingarnar um samveru samanskrivaðar og nágreinaðar sambært siðvenjuni á økinum, ásetingin um samveru millum ættleitt barn og uppruna skyldfólk verður nágreinað, og rættað verður í lógini, so samsvar er ímillum foreldramyndugleikalógina og rættargangslógina.

Broytingina í § 21, sum skal forða fyri samverusjikanu, metir nevndin vera av størsta týdningi at fremja. Endamálið við foreldramyndugleikalógini er at virka fyri barnsins besta og tryggja rættin hjá barninum at hava tilknýti og samveru við bæði foreldrini. Hendan broytingin tryggjar, at ásett samvera bara dettur burtur, um foreldrini hava avtalað tað, ella um Familjufyrisitingin ella rætturin taka avgerð um hetta. Hetta fer frameftir at forða bústaðarforeldrinum einsamøllum í at avlýsa avtalaða samveru, eins og bústaðarforeldrið skal leggja sína feriu saman við barninum við virðing fyri longu avtalaðari ella ásettari samveru.

Nevndin tekur somuleiðis undir við broytingini í § 29 í lógini um, at foreldrini frameftir hava felags ábyrgd av ferðingini í samband við samveru. Hetta ber í sær, at tað eru foreldrini, sum skulu avtala, hvussu ferðast verður, og hvussu býtið av útreiðslunum er. Frameftir verður tað bert í heilt serligum førum, og um tað verður mett at vera órímiligt, at annað av foreldrunum hevur ábyrgd av einum parti av ferðingini, at Familjufyrisitingin tekur avgerð um hetta.

Ein samd nevnd tekur tó ikki undir við broytingini í § 45 í lógini um at avmarka rættin hjá foreldrunum til ókeypis advokatumboðan til mál, sum snúgva seg um, hvar barnið skal búgva. Hetta eigur

framhaldandi eisini at vera ein rættur í málum um samveru. Tá mál um samveru gerast aktuell, eru bæði foreldur og børn ofta í kreppu, og tað er vorðið nevndini greitt undir viðgerðini av málinum, at tað kann lætta um málsviðgerðina og vera við til at fremja loysnir millum foreldrini, um foreldrini beinanvegin hava køn fólk undir liðini á sær, tá viðgerðin av einum tílíkum máli byrjar, um tey ynskja tað. Rætt til ókeypis advokatumboðan hava tey, sum lúka treytina um inntøkumark í rættargangslógini í málum um fría rættarførslu, sum sambært § 353 er kr. 329.000 (2019-tøl).

Í lógaruppskotinum verður grundgivið við, at hædd er ikki tikin fyri fíggjarligu avleiðingunum av eisini at veita ókeypis advokatumboðan í samverumálum, at einki varð nevnt um samverumálini í upprunauppskotinum til foreldramyndugleikalógina, ella at arbeiðsbyrðan í Familjufyrisitingini øktist munandi av hesum. Nevndin metir tað hvørki vera til gagns fyri barnið ella foreldur at avmarka rættin til ókeypis umboðan, sum skotið verður upp, og heldur, at skipanin eigur at sleppa at standa sína roynd.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis:
   "(Samverusjikana, ferðing í sambandi við samveru og aðrar broytingar)"

2. Í § 1, nr. 11 verður § 45, stk. 1 orðað soleiðis:
   "Foreldur, ið eru partur í einum máli um bústaðin hjá barninum sbrt. § 18 og um samveru sbrt. §§ 20 og 21, hava rætt til ókeypis advokatumboðan."

3. § 1, nr. 12 verða strikað. Nr. 13 verður eftir hetta nr. 12.

4. § 2 verður orðað soleiðis:
   "Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024."

Viðmerkingar
Til nr. 1
Frágreiðandi heitið verður tillagað samsvarandi broyting nr. 2 og 3.

Til nr. 2 og 3
Við hesum broytingaruppskoti verður rætturin hjá foreldrum til ókeypis advokatumboðan í málum um samveru varðveittur.

Sambært uppskotinum hjá landsstýrismanninum skal rætturin til ókeypis advokatumboðan ikki avmarkast til mál, sum eru til viðgerðar í Familjufyrisitingini, men eisini fevna um mál, sum verða kærd til Føroya Kærustovn. Broytingaruppskotið hjá nevndini leggur eisini upp fyri hesum.

Til nr. 4
Í uppskotinum er í § 2, stk. 2 ásett skiftisregla um tey samverumál, sum eru byrjað, áðrenn 1. januar 2024. Grundað á omanfyri tilskilaðu broytingar er ikki neyðugt við nakrari skiftisreglu, og hon verður tí strikað.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 5. desember 2023

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur